Nr. 79 - 26. apríl 2003 Sosialurin 5

# Hendingarríkir dagar í Runavíkar-økinum

**Gongst sum væntað, og veðurgudarnir halda sær í skinninum, kann roknast við, at fleiri túsund fólk fara at vitja á fiskivinnu- og alistevnuni á havnalagnum í Saltangará í komandi viku**

NÚ NÆRKAST
*Vilmund Jacobsen*

Stívliga 7.000 fólk vitjaðu North Atlantic Fish Fair stevnuna, sum varð hildin í Runavíkar-økinum fyri tveimum árum síðan. Nú stevnan verður fyriskipað á øðrum sinni, eru framsýnararnir fleiri enn áður, og framsýningarøkið er eisini størri. Tí kann væntast, at rættiliga nógv fólk verða at síggja á havnalagnum og á gøtuni í Runavíkar kommunu hesar dagarnar, stevnan varar.

## Aktivt vinnulív

Onkur spyr kanska, hví stevnan ikki er í Havn.

– Tað er eingin, sum sigur, at úrslitið hevði verið betur enn tað sama. Royndir úr eitt nú Danmark vísa, at fiskivinnustevnur í Keypmannahavn hava ikki fingið so góða undirtøku, sum í Ålborg, siga stigtakararnir, Áki í Skemmuni og Andrias Jacobsen.

Á Skálafjørðinum er aktivt vinnulív og nógv sjóvinna. Her eru landingarmiðstøðir, fiskavirkir, ídnaðarvirkir, reiðaravirkir, stovnar og eitt ríkt handilslív.

## Náttúrligt val

Stigtakararnir, sum báðir búgva í Runavíkar kommunu, halda, at havnalagið í Saltangará er vælegnað til eitt slíkt tiltak, sum at kalla burtur av snýr seg um vinnuna.

– Vit halda, at Runavíkarøkið er eitt náttúrligt val. Saman við Norrönu, sum hotell-skipi, kunnu karmarnir um North Atlantic Fish Fair neyvan vera betur, halda teir báðir.



*Nýggja Norröna fer at taka seg væl út við bryggjuna í Saltangará, har hon verður hotell-skip í samband við North Atlantic Fish Fair*











